


*Reyðar kvinnur og grønir menn. Kynsbýtið skal var so javnt sum gjørligt – eisini í trafikkinum. Tað halda alsamt fleiri býráð í Danmark, sum nú skifta nakrar av maskulinu ljóskurvunum út við femininar.*

# Reyðir menn í kjóla

ALSAMT FLEIRI STAÐNI Í DANMARK ERU **REYÐU** OG **GRØNU** MENNINIR, SUM **HJÁLPA** GONGUFÓLKI TRYGT TVØRTURUM **VEGIN**, SKIFTIR ÚT VIÐ **KVINNUR** Í KJÓLA. **JAVNSTØÐA** SKAL VALDA, VERÐUR SAGT



**JAVNSTØÐA**
Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

– Steðgið! Tað er reyður maður… ella… ehh… kona!

Andlitsbrøgdini eru undrandi, tá ein dama í kjóla sigur fólki, at tey nú skulu bíða við at fara tvørturum vegin. Reyði maðurin hevur fingið kjóla og er nú vorðin til eina konu.

### Við einum smíli

Spurningurin um hví ljóskurvarnar skulu vera so mannsdomineraðar var av fyrstan tíð reistur í Viborg. Har skuldu nýggjar ljóskurvar setast upp, og í tíðini frammanundan høvdu tey tosað nógv um javnstøðu á býráðnum.

Tey vistu tó ikki reiðiliga, hvussu tey skuldu fáa meiri javnstøðu inn í býarmyndina. Men so sló tað tey, at tað sjálvsagt var upplagt at fáa javnstøðuna inn umvegis ljóskurvarnar, sum allíkavæl skuldu skiftast.

Tí bílegði kommunan nakrar ljóskurvar, har ímyndirnar ikki vóru menn, men kvinnur í kjóla. Femininu ljóskurvarnar vóru tó settar upp við einum smíli – og ikki eini ítøkiligari ætlan um at kollvelta býtið millum kynini.

Men hugskotið hevur breitt seg um Flatlond, og nú eru eisini reyðar konur at síggja í ljóskurvunum í danska høvuðsstaðnum.

Socialdemokraturin Thor Buch Jensen í sosialu nevnd í býráðnum í Keypmannahavn var heitur fortalari fyri hugskotinum, og nú byrja kvinnurnar so smátt eisini at hjálpa fólki til gongu tvørturum keypmannahavnsku vegirnar.

Myndirnar er tiknar á HC Andersens Boulevard í miðbýnum í Keypmannahavn.

## INNIHALD

4 KAPPING: **ELNA HØGENNI OG JOHN A. POULSEN VUNNU BRÚDLEYPSKAPPINGINA**
6 BAKGRUND: **YOU TUBE**
7 TIPS: **BESTILTUR MÓTI**
8 90 SEKUND: **MIKKJAL HELMSDAL**
10 SAMRØÐA: **NICLAS HERI JÁKUPSSON – FRÁ STRONGD TIL LÍVSGLEÐI**
12 REPORTASJA: **HEIMSATLASIÐ SKAL ENDURSKOÐAST**
14 TIL ARBEIÐIS: **GUNNVÁ EIRIKSDÓTTIR**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **NÝGGJUR FELAGSSKAPUR VIL FÁA LESANDI HEIMAFTUR**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **DESSERTKØKA VIÐ FRUKT**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

**KLUMMAN**



*Inna Törnroos*

# Gamla gula húsið

Tað nívir mítt nostalgiska hjarta, at vakra, gula húsið í Hoydølum nú skal standa tómt.

Har tók eg míni fyrstu trilvandi fet út í vaksnamannalívið, tá eg 15 ára gomul flutti úr Sørvági til Havnar at ganga á studentaskúla. Kostdeildin gjørdist tann trygga ramman, har vit bygdabørn fingu tríggjar góðar máltíðir, plus tvær millummáltíðir – oftani við heimabakaðari kaku.

Fyrstu tvey árini deildi man kamar, og triðja árið slapp man í egið kamar.

Eg búði á Dreingjakostdeildini, og vit hildu okkum nokk vera eitt sindur skrappari enn genturnar á Gentukostdeildini. Sentrum í húsunum var mynttelefonin og uppihaldsstovan við teimum gomlu slitnu sofunum og sjónvarpinum.

Eg búði har í trý ár – 1988-1991, og stutt eftir, at eg flutti út, var húsið gjørt um til skúlabygning, og bygdabørnini flutt út í býin.

Sjálvandi var kostdeildin brandfarlig, tað vistu vit nokk øll sum búðu har. Men kraftigu krókarnir undir vindeyganum, og línurnar í skuffunum, vóru okkara tryggleiki, at vit nokk sloppu út, um tað endaði galið.

Onkutíð minti onkur okkum á, at húsið, vit búðu í, var eitt gamalt sanatorium, og nógv fólk vóru deyð har inni. Eg má siga fyri mín part, at tað rørdi meg ikki nevnivert. Omma mín var ein av teimum mongu, sum fekk tuberklar undir øðrum heimsbardaga, og tá týsk bombuflogfør flugu yvir Føroyum, vóru hon og hinir sjúklingarnir fluttir niður í kjallaran. Omma, ið tá var batnað nakað, gjørdist sjúk av kuldanum í kjallaranum og doyði frá manni og fýra smáum børnum.

Myrka søgan hjá gula húsinum var onki, ið skuggaði lívsgleðina, tey árini eg búði har. Eg eri glað fyri tíðina í húsinum, og eg eri vís í, at um kostdeildin ikki tók ímóti okkum bygdabørnum, høvdu nokk nógv av okkum ongantíð fingið húgvuna á høvdið.




VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Elna Høgenni og John A. Poulsen / Mynd: Jens Kristian Vang